T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

## Fundur fyri handilsrekandi í Tórshavnar kommunu

### Umhvørvisvika 2006

Tórshavnar kommuna skipar á hvørjum ári fyri umhvørvisviku og í ár verður umhvørvisvikan frá 15. - 21. mai 2006. Í hesum sambandi verður skipað fyri ymiskum tiltøkum um umhvørvið og er millum annað ætlanin at seta fokus á heilsu- og umhvørvisvinarligar vørur v.m.

Tórshavnar kommuna metir tað vera av stórum týdningi at kunna brúkaran um hvørjar vørur eru sunnar og umhvørvisvinarligar og hvar tær kunnu keypast.

Heitt verður tí á øll handilsrekandi, t.e. handlar, matstovur, venjingarmiðstøðir v.m. um at luttaka í umhvørvisvikuni við einum ella fleiri av tygara heilsu- og umhvørvisvinarligu vørum.

Tórshavnar kommuna bjóðar øllum handilsrekandi í kommununi til fundar á Hotel Hafnia, hósdagin 23. mars 2006 kl. 8.30 til 10.00 hesum viðvíkjandi.

Tygum verða biðin um at boða frá luttøku áðrenn 22. mars 2006 kl. 12.00 við at venda tygum til Kunningarstovuna á tlf. 302425 ella Tórshavnar kommunu, umhvørvisdeildina á tlf. 302010 lok. 1311 og 1312.

Á www.torshavn.fo/umhvorvi liggur tilfar um umhvørvisvikuna 2006 við oyðublaði at fylla út. Áðrenn fundin, verða tygum biðin um at fylla út oyðblaðið um umhvørvistiltøk og taka hetta við á fundin – eisini sjálvt um hetta ikki er liðugt at avhenda.



## Málninga-framsýningin hjá Lions Club Eysturoy

Árliga málningaframsýningin verður 1. og 2. páskadag (16. og 17. apríl) í Runavíkar skúla.

Áhugaðir luttakarar skulu siga frá seinast 1. apríl á telefon 443003, har nærri fæst at vita um treytirnar.

**Lions Club Eysturoy**

**Internet Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**

**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**
*HEIMARØKTIN*

## Sjúkraøktarfrøðingar Heilsurøktarar Heilsuhjálparar

**Frítíðaravloysarar**
Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysarum at arbeiða í skiftandi vaktum í Heimarøktini í Eysturoynni, í tíðarskeiðnum 15. mai til 31. august 2006.

**Náttarvakt á eldrasambýli**
Søkt verður eftir heilsurøktara ella heilsuhjálpara at arbeiða sum náttarvakt á eldrasambýlinum »Vesturstovu« í Fuglafirði 20 t./viku frá 1. mai 2006 ella skjótast til ber.

Vit sóknast eftir røktarstarvsfólki við royndum innan heimarøkt, sum kunnu arbeiða sjálvstøðugt, hava góð samskiftis- og samstarvsevni og duga at arbeiða undir skiftandi umstøðum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Um tú ynskir at vita meira um størvini ert tú vælkomin at ringja til økisskrivstovuna, tlf. **449249.**

**Umsókn:**
Skrivliga umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til

**Heimarøktin - øki 3**
att: Ása Hanusson, økisl.
Postrúm 47 · Heilsumiðstøðin
FO-620 Runavík

**Umsóknarfreist:** 15. apríl 2006.

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

## Aðalfundur

Maskinmeistarafelagið hevur ársaðalfund

**leygardagin 8. apríl kl. 14.00**

á Grønlandsvegi 56.

Skrá sambært lógini.

**Nevndin**

## Íbúð í Tórshavn

Søkt verður eftir eini íbúð til eitt av starvsfólkum okkara frá 1. august 2006.

**Jarðfeingi**
**Tlf. 357000**

**Heimarøktin Vágoy/Norðstreymoy**

## Summarferiu-avloysarar

**Lýst verður eftir summarferiu-avloysarum í tíðarskeiðnum 1. juni til 31. august 2006**

**Søkt verður eftir sjúkraøktarfrøðingum at arbeiða í økjunum:**
- Vestmanna/Kvívík
- Sundalagið/Eiði
- Vágoy

**Vit søkja eisini eftir heilsuhjálparum at arbeiða úti í Heimarøktini í økjunum:**
- Vágoy - allar bygdir
- Vestmanna/Kvívík
- Sundalagið/Eiði

**Somuleiðis verður søkt eftir heilsuhjálparum og heilsurøktarum at arbeiða inni á hesum Eldrasambýlum:**
- Korndalsbýlið á Eiði
- Eldrasambýlið í Vestmanna

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt spennandi og mennandi starv har arbeitt verður tvørfakligt
- Eitt starv við nógvum avbjóðingum
- Eitt starv í einum øki sum er í støðugari menning.

Meira fæst at vita um størvini við at ringja til Kristbjørg Toftegaard, varaleiðara tlf. 422570/214570 ella til økisskrivstovuna á tlf. 333249. Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. verður at senda til:

**Økisskrivstovan Vágar/Norðstreymoy**
Økisskrivstovan
370 Miðvágur

Umsóknarfreist: 3. apríl 2006 kl. 15.00.



## LOYSNIN!

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo